## Nýggjur ríkisumboðsmaður

Dan Michael Knudsen verður tann 1. januar komandi nýggjur ríkisumboðsmaður í Føroyum. Í tíðindaskrivi í dag verður sagt, at danska stjórnin hevur tilnevnt Dan Michael Knudsen sum nýggjan ríkisumboðsmann. Hnn kemur fyri Søren Christiansen. Dan Michael Knudsen er 45 ára gamal og er útbúgvin innan samfelagsfrøði. Hann hevur áður starvast innan føroysk fíggjarviðurskifti.

## 12 mió kr. í halli

Klaksvíkar Býráð hevur samtykt fíggjarætlanina fyri 2008. Hendan javnvigar við 213 mió kr., harav 45 mió kr. eru til íløgur. Skattaprosentið i kommununi verður óbroytt við 20,75%, og eru samlaðu inntøkurnar mettar til 140 mió kr. Fíggjarætlanin sýnir eitt hall á 12 mió kr. Kommunan umfatar ein bý og fimm bygdir. Á Borðoynni eru Norðoyri, Árnafjørður, Ánir og Klaksvík. Á Kalsoynni eru Mikladalur og Trøllanes. Tilsamans búgva sløk 4900 fólk í kommununi.

# Seinasta tíðin verið turbulent fyri partabrøv



**Partabrøvini á keypskálunum eru, við fáum undantøkum, lækkað nógv seinastu fimm vikurnar. Ilt er at siga í løtuni, hvønn veg tað ber, men luttakarar í Íløguspælinum hava bert 37 dagar eftir at gera gott við**



ÍLØGUSPÆL
*Hilmar Simonsen*

Kursirnir á partabrøvum skrambla niður í hesum døgum. Hví so er ber ikki til at greiða frá við fáum orðum. Stórar kurshækkingar seinastu 3 árini, óviss framtíðarútlit, órógv, subprime lánikreppan í USA, lágur dollari og høgur oljuprísur eru nakrar grundgevingar, sum ofta verða givnar. Eingin ivi er um, at partabrøv eru hækkað nógv seinastu 3 árini, men hesar hækkingar hava sum heild staðið mát við tær virðisøkingar, sum fyritøkurnar hava skapt. Tað vil siga, at partabrøvini eru ikki dýrari í dag, enn tey vóru fyri 3 árum síðani. Heldur er tað øvut, tí virðisøkingarnar í nógvum førum hava verið størri enn hækkingarnar í partabrævakursunum.

Samstundis sum kursirnir hjá flestu skrásettu fyritøkum eru lækkaðir nógv seinastu vikurnar, so eru partabrøvini vorðin munandi bíligari at ogna sær, tí ”price over earning” er nógv lægri nú.

### Fíggjarvinnan serliga hart rakt

Lat okum hyggja eftir, hvussu kursirnir hjá teimum skrásettu føroysku fyritøkunum hava broytt seg seinastu fimm vikurnar á keypskálanum í Reykjavík (ICEX).

Í Atlantic Petroleum kostaði eitt partabræv 24. oktober 1600 krónur, men 4. desember kostaði tað 1812. Hetta er ein hækking á 13,25 %. Tað mesta sum Atlantic Petroleum partabrævið er handlað fyri á ICEX er 2433 krónur, sum var 12. november 2007.

Eitt partabræv í Føroya Banka kostaði tann 24. oktober 219 krónur, tann 4. desember kostaði tað 199 krónur. Tað er ein lækking á 9,13 %. Tað mesta sum Føroya Banka partabrævið er handlað fyri á ICEX er 262,5 krónur, sum var 3. august 2007.

Eik partabrævið kostaði tann 24. oktober 698 krónur, tann 4. desember kostaði tað 539 krónur. Tað er ein lækking á 22,78 %. Tað mesta sum Eik partabrævið er handlað fyri á ICEX er 791 krónur, sum var 25. juli 2007.

Her síggja vit, at serliga Eik partabrøvini eru lækkað nógv seinastu fimm vikurnar, meðan Atlantic Petroleum hevur havt eina fitta hækking. Føroya Banki er lækkaður nakað, men ikki eins nógv og Eik.

At peningastovnar og fíggjarvinnan sum heild eru lækkað nógv seinastu tíðina er ikki nakað serstakt føroyskt fyribrigdi. Sama er hent kring allan heim, og tað kemur uttan iva í kjalarvørrinum á nógv umtalaðu sub-prime lánikreppuni í USA (sub-prime lán eru lán til kundar við lágum kreditvirði), sjálvt um flestu fíggingarstovnar ikki eru tyngdir av truplum sub-prime lánum. Kaupthing Bank er seinastu fimm vikurnar á keypskálanum í Íslandi lækkaður úr 1096 til 914 íslendskar krónur, sum er ein lækking á 16,61 %. Hægsti kursur Kaupthing partabrøv eru handlað fyri á ICEX er 1295 ÍSK, sum var 25. juli 2007.

Til samanberingar kann nevnast, at OMX-C20 vísitalið yvir 20 tey mest handlaðu partabrøvini á keypskálanum í Keypmannahavn lækkaði umleið 3,23 % í sama tíðarskeiði.

Sí talvu

### Smáir handlar flyta kursirnar nógv

Hjá virðisbrævameklarum fræettist, at nógvir smáir handlar hava verið seinastu tíðina, sum flyta kursirnar nógv. Hetta hóast ein skuldi trúð, at smáir handlar hava lutfalsliga lítlan týdning fyri veruligu virðið hjá fyritøkum. Og satt at siga, so er kursurin ikki eins umboðandi, tá talan er um handil við smáum nøgdum av partabrøvum, sum tá talan er um stórar handlar.

Tí kann vera torført at siga í løtuni, hvønn veg tað ber. Marknaðirnir hava seinastu tíðina verið nervøsir, kanska tí at stórir og tungir íleggjarar, til dømis hedgegrunnar, ikki luttaka serliga aktivt í løtuni.

Røddir hava eisini verið frammi um, at óvissan um avleiðingarnar frá subprime kreppuni í USA fer at standa við, til heilársroknskapirnir hjá fyritøkunum verða kunngjørdir eftir nýggjár.

Tað er við partabrøvum sum við framtíðini, at tað er sera trupult at spáa um. Enn er langt frá tí sum hendi mánadagin 19. oktober 1987, tá Dow Jones vísitalið lækkaði heili 22,6 % eftir bara einum degi. Tað er største lækking upp á ein dag í USA nakrantíð, og verður hesin dagur róptur Black Monday. Eingin hevur enn kunnað greitt frá, hví tað gekk so galið Black Monday. Aðrar tíðir uppførir marknaðurin seg beint øvut, uttan at nøkur serlig orsøk er til tað. Og tá eingin serlig orsøk er til stór sveiggj, so verður tað á fakmáli rópt ”irrational behaviour” (uml. ógrundaður atburður).

Lækkingarnar, sum vit hava sæð í seinastuni, fara neyvan at halda fram í tað óendaliga, fyrr ella seinni kemur vend í. Men nær tað hendir, er tað eingin sum veit. Tað eru einans 37 dagar eftir, til Íløguspælið endar, so her er ikki nógv tíð at geva av.

| Kursir* | Atlantic Petr. | Føroya Banki | Eik Banki | Kaupthing Bank | OMX-C20 |
|---|---|---|---|---|---|
| 24. okt. 2007 | 1600 | 219 | 698 | 1096 | 492,58 |
| 3. des. 2007 | 1812 | 199 | 539 | 914 | 476,68 |
| Broyting (%) | 13,25 | -9,13 | -22,78 | -16,61 | -3,23 |
| Hægsti kursur | 2433 (12. nov. 2007) | 262,5 (3. aug. 2007) | 791 (25. juli 2007) | 1295 (25. juli 2007) | 517,67 (11. okt. 2007) |
| *Allir kursir á keypskálanum í Íslandi uttan OMX-C20 | | | | | |